# Mín meining

ANNA HENTZE

Søldarfjørður

Eg las inni á Portalinum í kvøld, nú ið ein dagsferð er eftir av 2008, at Jóannes Eidesgaard ger seg til talsmann fyri ætlan um at krevja bústaðarskatt frá sethúsaeigarum, samstundis sum lønarskatturin skal lækkast.

Hetta er fyri at síðustilla leigarar og eigarar, og eisini fyri at fanga teir stóru DIS, NIS og FAS-fiskarnar, ið óhindraðir svimja gjøgnum meskarnar í skattatrolinum.

Vælsignaði hugsandi fólk, at gerið ikki hesa dáragerð.

Tað er mestsum eitt lívsverk at fáa sær eini hús.

Øll vilja eiga hesi somu hús. Bankarnir lata fígging, tá hús skulu byggjast ella keypast, og hetta lán verður afturgoldið ígjøgnum eitt drúgt áramál, - við skattaðum pengum, rímiligvís. So hevur verið tosað um, at tá lánið er goldið, og lønin er avloyst av pensjónini, kunnu fólk lívbjarga sær við at eta frívirðið í húsunum upp, til bankin aftur eigur húsini, og minnist meg rætt, var meiningin, at mann kann búgva har, so leingi mann livir.

Nú er so ætlanin, at tá fólk eldast, - tey, ið **hava** lagt lunnar undir samfelagið, ið so aftur tænir okkum øllum, - so skulu tey, ið hava goldið húsini hjá sær, gjalda **framvegis**, - nú til **landið**, av tí at tey **eiga** húsini, tey búgva í. Og ein skal hvørki vera frøðingur ella nakað annað fyri at skilja, at um fólk ikki eiga ríkiligt av peningi, tá pensjónin avloysir lønina, so er bara ein spurningur um tíð, til tey ikki hava **ráð** longur at **eiga** húsini. Tað sigur seg sjálvt: Situr ein á einum flaka, og verður noyddur at saga eitt petti fyri og annað eftir av flakanum, so er hann burtur um eina tíð, um einki tilfar er við hondina at bøta við.

Hvar skulu fólk tá fara? er ætlanin at gróðurseta slum-økir í landinum? Ha?

Veðurlagið hjá okkum er fínasta slag, tá vit hava heit klæðir og góð hús, men tað riggar ikki til at vera heimleysur í.

Tað eru so nógv viðurskifti, ið eg ikki skilji, men um myndugleikarnir ætla at gera so stór inntriv, at fólk skulu krevjast eftir bústaðarskatti, - er tað tá ikki líka lætt, heldur at krevja lønarskatt frá øllum borgarum sum njóta gott av samfelagnum?

Lønarskattur er ein samfelagsskylda. Bústaðarskattur er revsing.

# Ein bíðandi løgmaður



JENIS AV RANA

formaður Miðfloksins

Løgmaður visti lítið og einki nýtt at siga okkum í nýggjársrøðu sínari.

Fíggjarmálaráðharrin royndi seg í grein í Sosialinum við boðum upp á loysn, men heldur ikki har var stórvegis nýtt at hóma.

Og uttanríkisráðharrin, triði leiðarin í samgonguni, jarðaði beinanvegin høvuðsuppskot fíggjarmálaráðharrans.

Fyri tíggjundu ferð, ella fleiri, fegnaðist løgmaður um, at vit sleppa at bíða. Bíða eftir tí loysn, danska stjórnin kemur við í roynd teirra at loysa búskapar- og fíggjartrupulleikar sínar.

Høvuðsleiðin fíggjarmálaráðharrin leiddi okkum var sum sagt ikki nýggj - men tann vanliga hjá fyrrverandi javnaðarmonnum. Enn eina vitjan ætla teir sær hjá teimum gomlu. Hesi skulu, eftir eitt langt lív við hugsjón um ikki at skylda nøkrum nakað, enn einaferð gjalda gildi spekulantanna. Hesaferð biðja teir um hjálp at áleggja hesum samfelagsins fátækastu ognarskatt fyri heim síni.

Lagnunnar speisemi, at tað verður Fólkaflokkurin, umenn av øðrum orsøkum, ið steðgar hesum samhaldsleysa politikki teirra.

So gott sum einki sæst í røðu løgmans um, hvussu vit hjálpa teimum, ið kreppan longu hevur rakt. Tey, sum í heyst uttan ávaring vórðu send út í arbeiðsloysi. Ella tey gomlu, sum samgongan var á vitjan í lummunum hjá, áðrenn jólafriðurin væntaðist.

Sjálvfylgiligheitir, uttanumtos, ella bíðan eftir dønum gjalda ongar rokningar. Tað gera afturvendandi ætlanir um at hækka arbeiðsloysisgjaldið frá sjeyti til áttati, visiónir Barak Obama's, ella at nokta fólki at gjalda fullan prís fyri rúsdrekka og cigarettir, heldur ikki. Hvørki í banka, hjá handilsmanni ella aðrastaðir.

Er nakar politikkur yvirhøvur annar enn at bíða eftir dønum? Ella nakrar hugsjónir. Ella er tað trýstreingjaða vorðið fyrimyndin - tríggir flokkar, tríggir leiðarar, tríggjar hugsjónir, ongin politikkur?

Er ongin hugsjónarmaður í leiðslu samgongunnar? Ein, ið kann greiða høgu harrunum frá, at meðan tú vónar tað besta, sær ljóst upp á framtíðina, ert bjartskygdur og lítur á "egnan mát og megi", er onki, ið forðar tær at smoyggja upp um armar, byrgja upp fyri kreppu og seta í kortið út kós?

**Billy Graham**

# Lógloysis eldurin



SIMUN PAULI JACOBSEN

Bíblian lærir okkum, at synd er lógarbrot (1. Joh. 3,4). Orðið »overtrædelse« kann umsetast til »lovløshed«. Jesus segði, at móti endans tíð skuldi tað vera ein heimsumfatandi uppreistur mótvegis lógum og skipaðum viðurskiftum. Uppreistur og lógloysi er nakað, ein í dag møtir í nógv størri høpi enn nakrantíð áður í heimssøguni. Børn reisa seg upp ímóti foreldrunum, so foreldrini eru rædd fyri teimum. Ungdómurin ger uppreistur móti lærarum sínum, unversitetsstudentarnir móti teimum fyrisitingarligu myndugleikunum. Tað eru skipaðar royndir at niðurgera løgregluna, at flenna at løgregluni og at spotta hana. Alt hetta er ein partur av tí vanliga respektloysinum fyri lóg og ordan.

Vit áttu at ógvast við, at í fleiri londum eru skipað brotsverk hin besta forrætningin. Veruleikin er, at fyri ikki langari tíð síðani kundi ein av Amerikas leiðandi brotsmonnum siga: »Tey skipaðu brotsverkini eru betri forrætning enn stjórnin í USA«.

Inntøkurnar av brotsverkum eru upp ímóti 10% av statsins inntøkum. Hetta kostar okkum meira enn alt okkara útbúgvingarprogramm og vælferðarprogramm tilsaman. Skipaðir brotsmenn og mafian hava kontroll yvir einstøkum av heimsins størstu býum. Hartil koma teir óskipaðu brotsmenninir, og teir eru nærum eins ringir, um ikki verri.

Brotsverkini vaksa í einum tílíkum tempo, at vit liva á markinum til uppreistur og anarki. Tað er vandafult at ganga á gøtunum í myrkri í nærum øllum býum í Amerika. tað er eins og hóttandi, yvirnáttúrligar kreftir eru slopnar leysar. Brotsverkini hótta við at spenna um alt samfelag okkara, tí so hvørt sum brotsverkini vaksa í tali, svíkur eisini landsins moralski grundvøllur meir og meir. Politimeistarin í einum av okkara størru býum segði við meg fyri stuttum: »Tað er greitt, at tað lønr seg at fremja brotsverk«. Hann segði, at meira enn helmingurin av brotsmonnunum í hansara býi gingu leysir. Teir flestu av teimum vórðu ongantíð funnir, og tá tað ráddi um teir, sum tiknir vóru, so hevur løgreglan ein sera torføra uppgávu við at prógva nakað, sum rætturin við góðkenna.

Hvat er svarið upp á brotsverkanna stóra trupulleika? Er tað eitt meira effektivt og betur útbygt politiapparat, betri útbúgving, strangari straff? Hvr er orsøkin til at land okkara er fremst í heiminum, tá tað ræður um brotsverk, og tað mitt í eini tíð við yvirflóð, sum heimurin ongantíð áður hevur sæð makan til?

Vit hava lært seinastu tíggju árini, at moralfatan er relativ, og nú heysta vit tað, vit hava sáað. Hugsanin innan skúlar okkara, við dómstólarnar eins og í fjølmiðlunum er ofta tann, at ein ignorerar offurið fyri brotsverki mótvegis sjálvum brotsverkinum. Í einstøkum førum gera vit harumframt brotsmannin til eina hetju. Eg havi lagt til merkis, at lógarinnar útøvarar í landi okkara ofta eru mótleysir ... Teir merkja, at dómstólarnir ikki samarbeið við teimum.

Brotsverkastatistikkurin er astronomiskur. Lógarinnar hondhevarar hava hvørki pening ella fólk at gera arbeiði sítt til fulnar. Eingin tykist at hava ábyrgdina. hetta er ein annar av teimum mongu logum, vit ikki makta at fáa tamarhald á.

*Kelda: Billy Graham, »Verden i Flammer« 1971. Símun Pauli Jacobsen, Vestmanna, týddi.*

# Býttleikakreppa

RANDI S. VANG

Havi verið uttanlands í nakrar mánaðir. Júst afturkomin hoyri eg í Kringvarpi Føroya, at fíggjarlógin er til umrøðu. Ein vælnøgd mansrødd ljóðar úr lurtinum, sera vælnøgd og "skilagóð" tykist maðurin sjálvur at halda, sum eigur hana. Vísu orðini eru: ein króna ella peningur til Fróðskaparsetur Føroya er "om igen" peningur í lumman á enn einum havnarfólki!!!!

Ísland er í svárari fíggjarkreppu, sum teir kunnu gera nakað við. Føroyar hava eina politiska BÝTTLEIKAKREPPU, sum tíverri bara stendur við og versnar, hon tykist ikki renna av aftur í bræði.